Týsdagin andaðist

**Ragnhild Dybczak**
**Tórshavn,**

84 ára gomul.

Kistan fer úr heiminum við Vallalíð hósdagin kl. 16.00.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin kl. 13.00. Sálmabókin verður nýtt.

***Familjunnar vegna***
**Connie og Magn**

Tey, ið ynskja at minnast Ragnhild, kunnu lata Heiminum við Vallalíð eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

---

Elskaði maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Jalgrím Hilduberg**
**ættaður frá Gjógv, búsitandi í Havn,**

andaðist týsdagin 15. februar, 80 ára gamal.

Kistan fer úr landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 18. februar kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin 19. februar kl. 12.

***Vegna familjuna***
**Berghild,**
**Regin, Beinta, Eyðun, Unn og Durita**

Tey, ið vilja minnast Jalgrím, kunnu lata Krabbameinsfelagnum eina gávu.

---

## TØKK

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá mostir okkara

**Saloma Elisabeth Poulsen**

doyði og varð jarðað.

Takk til Norðoya Røktarheim fyri tíðina, hon búði har.
Takk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum.
Takk fyri blómur. Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Takk fyri peningagávur til Niðristovu.

**Systurbørnini**

---

# Nøvn

# Ólavur Hátún 80 ár

Kundi ímynda mær, at tit bæði Ása lógu og rókust suðuri á Nilánni tann 17. februar, har ætlanin var at halda 80 ára føðingardagin í friði og náðum. Men har var eingin friður – Mubarak fyri at takka. Ferðin suður á Nilánna varð tískil avlýst. Annaðhvørt á Nilánni ella her uppi ovast á Heiðavegi ert tú ein so merkisverdur maður, at illa ber til at leypa teg um. Nú tú rundar kappaaldurin – sambært mæta danska sálmaskaldinum, N.S.F. Grundtvig, ert tú framvegis virkin – hvat ert tú gjørdur av? kundi veri spurt. Ymist er hvussu hvør einstakur okkara er útborin. Mong teirra, ið hava roynt at liva eitt heilsugott lív og harvið farið væl við sær, hava kortini ikki rokkið høgan aldur og eldust illa, meðan onnur, vit halda ikki eru farin so væl um seg, eru komin upp í ellisárini. Ilt er at meta um hetta. Sigast kann um hann, Ólav Hátún, at hann hoyrir undir tann seinna bólkin – ikki júst tí at



hann er farin so serliga illa við sær, men kortini hevur kunnað tikið til sín og notið blíðskap í góðum vertskapi eins og vit onnur uttan at vera tikin av fótum. Vanligt er at so hvørt sum árini leggjast til, linkar virksemi, men hjá Ólavi hevur tað virkað øvugt. Tað gongur sjón fyri søgn.

Vit báðir, Ólavur, hava havt nógv saman frá smádreingjaárum okkara í Kvívík, Vestmanna hjá Pidda og Hildu inni á Fjørð, Eyðálvi uppi á Heygum og Brynjálvi og ikki minst í Havn, har eg kendi meg sum heima hjá Hjalmari og Brynhild í skúlatíðini úti á VBV síðst í 1940-árunum. Skyldskapur, vinskapur og ættarkensla hava havt ein sera stóran og sterkan lut í okkara langa lívi.

Tá Hjalmar varð settur sum lærari í Kvívík stutt fyri kríggið, var eg bara 8 ára gamal. Hann var til verka fúsur og birti nýtt lív í bygdina. Hann skipaði fyri kórsangi, ítrótti – svimjing, fótbólti og fimleiki og eisini sjónleiki. Okkum báðum – javnaldrum – dámdi væl at syngja, og í skúlanum varð mangan sungið fleirraddað í sangtímanum. Eini jól undir krígnum, tá kórið sang undir gudstænastuni í Kvívíkar kirkju, har Hjalmar var organistur, vóru vit báðir kosnir at syngja ALT-røddina í blandaða kórinum. Tað hepnaðist ikki so væl. Vit báðir løgdu til av øllum alvi, so at okkara partur ikki skuldi liggja eftir. ALT-røddin skaraði so nógv framúr, at hon forkom tí vakra ljóminum.

Óneyðugt er at lýsa tann stóra týdning, ið Ólavur hevur havt fyri tónleikalívið í ein mansaldur – áhaldandi og ótroyttiligur. Tað havi eg nevnt fyrr. Eldurhugi hansara er ikki kødnaður enn. Í 45 ár hevur hann verið kórleiðari; fyrst í nýstovnaða útvarpskórinum, sum seinni broytti navn til Havnar kórið. Harumframt hevur hann skipað fyri kórstevnum og kórsangi í sambandi við hátíðarhald ymsastaðni í landinum. Fáur man hava gjørt honum hetta eftir.

Nú er bara eftir at ynskja tær so hjartaliga tillukku við áttatiáradegnum – nú hevur tú fingið meg aftur!

Gamli vinmaður og
skyldmaður tín.
**Ívar**

---

# Ber til at áseta arbeiðsskapandi tilfeingisgjald?

# Kjak



**Bjørn Kalsø**
*løgtingsmaður*

Í Degi & Viku í kvøld, 14. februar, boðaði Katrin Dahl Jacobsen, vinnunevndarformaður vegna Javnaðarflokkin, frá, at tey mæltu til at leggja sokallað arbeiðsskapandi tilfeingisgjald á makrelin.

Sambært vinnunevndarformanninum var endamálið við tilfeingisgjaldinum fyrst og fremst at skapa arbeiði á landi í Føroyum. Tí skuldi tilfeingisgjaldið differentierast við hægri gjaldi á landingar uttanlands.

Tá ið uppisjóvarskip undir vanligum umstøðum eru farin í útlendskar havnir at landa makrel, hevur verið vanligt at gjørt hetta í onkrari ES-havn, í Noregi ella í Íslandi.

Tey sum hava fylgt við gongdini í makrelmálinum seinastu tíðina vita, at ES og Noreg longu hava boðað frá, at tey als ikki fara at taka ímóti makreli frá føroyskum skipum í ár, orsakað av ósemjuni landanna millum um býtið.

Í Íslandi fer helst at bera til at sleppa av við makrel, hóast verkfall er á mjølverksmiðjunum í løtuni. Men ivasamt er tó, um tað fer at bera til at seta hægri tilfeingisgjald á makrel landaðan í Íslandi enn á landaðan makrel í Føroyum. Orsøkin til hendan ivaspurning eru reglur í Hoyvíkssáttmálanum, sum áseta, at somu treytir skulu galda fyri virkir í Føroyum og Íslandi.

Ein annar møguleiki kann eisini vera at landa til útlendsk móðurskip á feltinum. Men tá er neyðugt við serligum undantaksloyvi frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum. Vanligt hevur ikki verið at geva fleiri slík loyvi.

Um fiskiskapurin fer at vignast, fara føroysk skip tí ikki at hava nógv annað í at velja, enn at leggja makrelin upp her.

Sostatt er helst eingin dugur í uppskotinum hjá Javnaðarflokkurin um arbeiðsskapandi tilfeingisgjald, tí grundgevingarnar halda ikki.

Undrunarvert, at miðlamaðurin als ikki nam við hesi viðurskifti.